


Vit sóknast eftir starvsfelaga til eitt spennandi og fjølbroytt starv. Leiðslusamskiparin vísir beinleiðis til stjóran, og skal í høvuðsheitum taka sær av fylgjandi:

**Marknaðarføring**
Tú hjálpir sølu- og marknaðarleiðaranum at samskipa og avgreiða øll marknaðarføringsátøk felagsins. Tú hevur ábyrgd av okkara miðlaætlan, tú samskipar samstarvið við uttanhýsis veitarar og tryggjar, at øll raðfest marknaðarføringsátøk verða avgreidd sum ætlað.

**Rakstur**
Tú hjálpir rakstrarleiðaranum við samskipan og avgreiðslu av ymsum rakstrar- og fyrisitingarligum uppgávum. Samstundis hevur tú ábyrgdina av skeiðskalendaranum fyri øll 110 starvsfólkini hjá Føroya Shell.

**Umsiting**
Leiðslusamskiparin er eisini stjórnarskrivari hjá Shell, so tú hjálpir stjóranum og umsitigardeildini við samskipan og avgreiðslu av ymsum umsitingarligum uppgávum. Hetta kann t.d. vera prísbroytingar og prísútrokningar, dagføring av heimasíðu, innsavnan og tilrættalegging av tilfari til nevndina hjá Shell. Tú er skrivari á leiðslufundum, og hevur annars annað vanligt umsitingararbeiði um hendi.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini fyritøku, har nógvar spennandi broytingar henda í løtuni. Vit geva rætta persóninum góðar arbeiðstreytir, kappingarføra løn við eftirløn og førleikamennandi skeið. Tú fært møguleikan at tilrættaleggja starvið, arbeiðsdag og arbeiðstíð, so tað passar tær best – sjálvandi í samráð við stjóran. Starvið er eitt fulltíðarstarv, men um tú ynskir niðursetta arbeiðstíð, er eisini møguleiki til tess.

**Vit ynskja:**
Ein starvsfelaga við góðum yvirliti og góðum evnum innan samskipan, og vit vænta at tú trívist við støðugum avbjóðingum. Tú dugir væl við fólki, og tú hevur eitt lætt og fyrikomandi lyndi. Tú dugir væl at samskifta á bæði føroyskum og enskum, og hevur tú eina hóskandi útbúgving og royndir innan samskipan, er tað ein fyrimunur.

**Umsóknin**
skal sendast til Shell, Vestara Bryggja 10, FO 110 Tórshavn, ella til hendrik@shell.fo innan 24 januar kl 10.00. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hendrik Egholm, stjóra, á telefon 347410/215939, ella á omanfyristandandi teldupostadressu. Tú byrjar so skjótt tilber, tó ikki seinni enn 1. mars.

www.shell.fo




Shell søkir eftir dagligum leiðara til støðina á Frælsinum. Leiðarin hevur dagliga ábyrgd av støðini og kemur at ganga á odda fyri nógvum fittum starvsfólkum í einum vælsmurdum toymi.
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv, har rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín dám á støðina í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja**
ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar eginleikar:

- ✔ Ágrýtin
- ✔ Ábyrgdarfullur
- ✔ Álítandi
- ✔ Arbeiðssamur
- ✔ Jaligur og opin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Skapandi

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv í einum handilsumhvørvi í stórari menning. Vit geva rætta persóninum góðar arbeiðstreytir og neyðuga upplæring.

**Løn**
Lønsambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Leif Hovgaard á telefon 347400 ella fartelefon 211261.

**Umsókn**
Skrivligar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:
Føroya Shell, Vestarabryggja 10, FO-110 Tórshavn
att.: Leif Hovgaard
í seinasta lagi 31. januar 2008.

www.shell.fo